| **Heiti á verkætlan**:<br>Útbreiðsla, lívfrøði og fiskiskapur av longu og brosmu undir Føroyum | **Ár byrjan og endi**:<br>2013-2015 |
| --- | --- |
| **Skrivað hevur**:<br>Navn: Lise H. Ofstad<br>Stovnur: Havstovan<br>t-postur: liseo@hav.fo | |

**Endamálið við verkætlanini**:
Verkætlanin hevur sum endamál at uppdatera vitan um útbreiðslu, lívfrøði og fiskiskap av longu og brosmu undir Føroyum. Harumframt verður grundarlag lagt undir stovnsmetingar, við tí fyri eyga at kunna verða før fyri at siga, um veiðan eftir longu og brosmu undir Føroyum er burðardygg, ella hvat krevst fyri at uppfylla hesi krøv.

**Samandráttur av úrslitum**:

Útbreiðsla: Við Føroyar eru longa og brosma bæði á Landgunninum og við bankarnar vestanfyri. Harafturat er brosma eisini vanlig á Wyville Thomsonsrygginum. Longa er mest vanlig á 100 til 400 metra dýpi, meðan brosma vanliga er at finna nakað djúpari, millum 300 og 600 metrar. Tó ber til at finna longu og brosmu bæði grynri og djúpari enn hesi dýpi. Longa verður ikki roknað sum djúpvatnsfiskur, men tað verður brosma hinvegin.

Longa trívist í heitari sjógvi enn brosma. Longa verður fingin í sjógvi, har hitin er oman fyri 3 hitastig, meðan brosma verður fingin, har hitin fer heilt niður ímóti frostmarkinum. Tað er ikki vanligt at fáa brosmu, har sjóvarhitin er meira enn 9,5 hitastig.

Vøkstur: Longa veksur skjótari og verður longri enn brosma. Árligi vøksturin hjá longu, til hon verður kynsbúgvin, er góðar 10 cm um árið. Brosma, sum hinvegin veksur seint, veksur bert 2,5-3 cm um árið. Ársgamlar eru tær umleið líka langar (um 15 cm). Sum 5 ára gomul er longan vorðin umleið 60 cm long og vigar 1,2 kg, meðan brosman bert er umleið 43 cm long og vigar 800 gramm. Tá tær eru vorðnar 10 ára gamlar, er longan umleið 102 cm long og vigar 5,3 kg, meðan brosman er umleið 60 cm long og vigar 2,2 kg.

Kynsbúning og gýting: Longa búnast fyrr enn brosma. Longan er umleið 6 ára gomul (70 cm), tá helvtin hevur gýtt fyrstu ferð, meðan bromsan er árið eldri, tvs. 7 ára gomul (53 cm).

Gýtingartíðin hjá longu og brosmu í føroyskum sjógvi er tann sama, frá apríl til juni-juli. Hvørgin teirra savnast á ávísum gýtingarstøðum. Gýtandi longa er fyri tað mesta fingin á 120 til 300 m dýpi, meðan gýtandi brosma verður fingin djúpari, frá 200 m og niðari.

Fyri longu er talið á rognkornum undan hvørjum kvennfiski ómetaliga stórt, einar 20-60 milliónir, alt eftir stødd á fiskinum. Fyri brosmu er talið einar 2-3 milliónir.

Yngul og ungfiskur: Eftir gýting flotna rognkornini upp í sjógvin hjá bæði longu og brosmu, har larvurnar klekjast. Bæði rognkorn og larvur spjaðast við rákinum kring landgrunn og bankar.

Tá longu- og brosmularvurnar eru vorðnar til yngul, verða tær verðandi uppi í sjónum í nakrar mánaðir aftrat. Men tá yngulin er umleið 5-6 cm langur, fer hann niður á botn. Tað fyrsta ein sær til ungfiskin av longu (longukálvur), er tá hann er einar 35 cm og meira til longdar. Ungfiskurin av brosmu (brosmukálvur) sæst, tá hann er einar 20 cm til longdar.

Føði: Bæði longa og brosma eru stórátarar av fiski. 90-95% av føðini hjá vaksnari longu og brosmu er fiskur, eitt nú svartkjaftur og hvítingsbróðir.

Veiða: Undir Føroyum vera longa og brosma ofta veidd í sama fiskiskapi, serliga við línu, men eisini sum hjáveiða við troli. Aldursbýtið í veiðuni vísir, at meginparturin av fiskinum er millum 7-11 ár.

Stovnsmeting: Í ICES verður longa mett sum ein serføroyskur stovnur, meðan brosma verður viðgjørd sum partur av einum felagsstovni. Ein aldursgreinað stovnsmeting er gjørd av bæði longu og brosmu.

Úrslitið av seinastu stovnsmeting (2016) av longu undir Føroyum vísir, at tilgongdin hevur verið støðug millum 2-6 mió. 4-ára gamlir fiskar, burtursæð frá 2015, sum hevði eina tilgongd upp á 11 mió. fiskar. Stovnsstøddin av longu er vaksin seinastu árini, frá umleið 11 túsund tonsum í 2007 til 23 túsund tons í 2015. Veiðutrýstið varierar millum 0,21 og 0,50.

Stovnsmetingin av longu saman við mettum virðum fyri "referansuvirði" bendir á, at stovnsstøddin av longu í løtuni er størri enn møguligu virðini fyri MSY Btrigger. Modellering við alternativum referansuvirðum fyri longu vísir, at stovnurin tolir eina árliga veiðu á umleið 4300- 4700 tons.

Tað er fyrstu ferð, at ein aldursgreinað stovnsmeting er gjørd fyri brosmu undir Føroyum. Tískil er neyðugt at arbeiða víðari við hesum. Fyribils úrslit vísa, at tilgongdin av 4-ára gamlari brosmu er minkað frá umleið 6 mió. fiskum í 2004 til umleið 1 mió. fiskar í 2014, og síðani økt til 2 mió. í 2015. Stovnsstøddin av brosmu er minkað og hevur verið undir miðal seinastu 6 árini. Veiðutrýstið varierar millum 0,22 og 0,60.

Samanum tikið er líkt til, at fiskiskapurin eftir longu er burðardyggur í løtuni, meðan støðan viðvíkjandi brosmu er sera ógreið. Stovnsmetingarnar eru enn ikki góðkendar í ICES, og neyðugt er at fylgja væl við gongdini í stovnunum.

| | |
|---|---|
| **Váttan/undirskrift frá verkætlanarleiðara**: | |